

# Sp/f Átak byggir hús í Smiðjugerði

-Um ein lítlan mánaða verða sjey raðhús í Smiðjugerði í Havn klár at flyta inn í. Sp/f Átak við Torkil við Sandá á odda, ið stendur fyri byggingini

HÚSABYGGING

Um alt gongur eftir ætlan, skuldu húsini verið klár seinast í oktober mánaða.

Uppi við Bilfríðkuna í Smiðjugerði í Havn vóru fyri tveimum mánaðum síðani, sjey raðhús reist.

Húsini skulu seljast privatfólki. Húsini eru øll langtsíðani seld fyri eina upphædd, sum er áljóðandi 1.175.000 krónur.

# Gongur væl hjá Hess

OLJULEITING

*Jan Müller*

Í dag eru fjúrtan dagar, síðani The Faroes Partnership samtakið við Amerada Hess á odda fór undir at bora á føroyska landgrunninum. Sosialurin skilur, at tað hevur gingið væl at bora og eftir tí sum fakfólk á økinum kunnu rokna seg fram til, so vil borurin umborð á Sovereign Explorer koma fram á sítt fyrsta mál ein av fyrstu døgunum. Høvuðsmálið í brunninum Marjun liggur tó nógv longri niðri í undirgrundini møguliga á umleið 4000 metrum. Sum skilst eru fleiri mál (target) á veg niður eftir og er hetta fyrsta neyvan eitt av teimum, sum alt ov stórir møguleikar liggja í. Soleiðis sum leitimodellið og strukturin Amerada Hess fer eftir eru háttað, so verður millum jarðfrøðingar, sum hava hollan kunnleika til økið, mett, at borurin fer gjøgnum 3 ella fleiri mál á leiðini niður til sjálvt høvuðsmálið.

Amerada Hess byrjaði at bora 20. september og hava tað ikki verið trupulleikar við sjálvari boringini. Nú um dagarnar kom tó ein av manningini til skaða undir arbeiði og hetta verður tikið í størsta álvara. Blaðið skilur, at tilbúgvingar- og fráboðanarskipanin stóð sína roynd í hesum fyrsta óhappinum undir leiting.

Henda triðja boringin á landgrunninum í ár er mett at taka einar tveir mánaðir. Ikki bert føroyingar eru spentir um úrslitið, nú tað longu eru boraðir tveir turrir brunnar, eisini umheimurin og tað serstakliga oljufeløgini og bretskir myndugleikar fylgja boringini við stórum áhuga, tí eitt fund her kann fáa ávirkan á komandi leitivirksemið á øllum Atlantsmótinum. Tað kann seta gongd á fleiri boringar, sum annars eru ætlaðar seinni. Hinvegin kann enn eitt turt hol í økinum fáa negativa ávirkan á komandi virksemið.







